# Toskaalingin kann veksa skjótari enn laksaalingin

**Í ár taka norðmenn 12.000 tons av aldum toski, men um tíggju ár verður nøgdin ætlandi tíggju ferðir størri, og á marknaðinum kann tann aldi toskurin koma ístaðin fyri tann villa, sum minkar á okkara leiðum**



*Viknandi toskastovnar við Føroyar, Ísland og aðrastaðni geva rúmd fyri tí alda toskinum á marknaðinum*

TOSKAALING
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Eftir eina trilvandi og drúgva byrjan gongur tað strúkandi í norsku toskaalingini, og ongantíð hevur so nógvur tøkubúgvin toskur gingið í ringunum sum nú. Í fjør tóku alararnir góð 10.000 tons, í ár verður nøgdin oman fyri 12.000 tons, og næsta ár kemur hon ætlandi upp á 25.000 tons. Framtíðarútlitini tykjast so góð, at fær vinnan einki álvarssamt bakkast, fara norsku alistøðirnar at taka 100.000 tons av toski um fýra ella fimm ár.

- Møguleikarnir eru stórir, sigur Per Sture Mork við NTB. Hann er stjóri í alifelagnum Branco, sum hevur eina stóra toskaalistøð uttan fyri Brandal, og stjórin hevur góðar vónir:

- Vit ætla at taka 1.000 tons í ár, og um eini trý ella fýra ár ætla vit at taka tíggju ferðir so nógv, sigur hann.

### Stórur íløguhugur

Tær góðu framtíðarvánirnar hjá toskaalingini hava gjørt, at tað stendur ikki á hjá feløgunum at fáa fatur á neyðugum kapitali til útbyggingar. Eitt nú fekk Branco 44 mió. krónur burtur úr einari nýtekning herfyri, og fleiri onnur alifeløg so sum Grieg Seafood, Codfarmers og Spon Fish java gjørt tað sama.

Sambært NTB hava íleggjarar víst toskaalingini so stóran áhuga, at teir seinastu 15 mánaðarnar hava alifeløgini fingið næstan eina mia. krónur í nýggjum kapitali.

Øystein Steinø, stjóri í alifelagnum Codfarmers, vísir á, at á teimum vanligu fiskileiðunum er minni toskur at fáa nú enn fyrr, og tað saman við størri eftirspurningi ger, at toskaaling hevur so góðar framtíðarvánir. Sjálvur roknar hann við, at hansara felag fer at taka 20.000 tons av toski innan fýra ár. Og útlitini eru sera góð, sigur hann:

- Toskaalingin fer at veksa skjótari, enn laksaalingin gjørdi, og eg eri sannførdur um, at um tjúgu ár fara vit at taka líka nógvan tosk sum laks, sigur Øystein Steino við NTB.

### Loysir villa toskin av

Hóast tann norska toskaalingin veksur skjótt, og hóast framtíðarútlitini eru sera góð, er vinnan framvegis ikki sloppin av við sínar barnasjúkur, og svinnið er sera stórt. Mett verður, at umleið 30 prosent av tí, sum verður sett út, fer fyri skeyti. Nógvur fiskur doyr í ringunum, og harafturat hava nógvar støðir havt trupulleikar av, at fiskurin sleppur til rýmingar. Hetta eru trupulleikar, sum mugu loysast, um vinnan skal hava eina framtíð, sigur Per Sture Mork.

Ein annar spurningur er, nær toskaalingin verður so stór, at hon fer at ávirka toskaprísin á marknaðinum. Enn hava eingir trupulleikar verið, men spurningurin er, hvat hendir, um 100.000 tons av aldum laksi koma á tann evropeiska marknaðin.

Men kanska kunnu teir veiku toskastovnarnir í Norðuratlantshavinum hjálpa toskaalingini. Í Føroyum og Íslandi er toskafiskiskapurin minkaður nógv tey seinastu árini. Í Íslandi hevur stjórnin gjørt av at skerja kvotuna ein triðing næsta fiskiár, og fyrsta dagin fæst ætlandi at vita, hvat føroysku myndugleikarnir ætla at gera. Teir norsku toskaalararnir bíða.

- Hetta eru viðurskifti, sum kunnu gera, at marknaðurin fer at hava pláss fyri tí alda toskinum, sigur marknaðarserfrøðingurin Ragnar Nystøyt við NTB.

## FAKTA

um norska toskaaling

Tær fyrstu norsku royndirnar at ala tosk vórðu gjørdar síðst í sjeytiárunum, men alingin gav ongantíð meiri enn nøkur hundrað tons um árið. Síðst í nítiárunum vórðu fleiri smoltstøðir bygdar, og tá kom ferð á vinnuna.

Síðani 2000 eru íløgur fyri næstan tvær mia. krónur gjørdar í toskaaling í Noregi, og meginparturin av privatur kapitalur.

Higartil hava 182 feløg fingið loyvi til at ala tosk, og tey hava tilsamans 463 aliloyvi. Av teimum eru 213 í nýtslu í løtuni.

Í 2004 vórðu 1.685 tons av aldum toski tikin, og í fjør var nøgdin oman fyri 10.300 tons, og søluvirðið var 261 mió. norskar krónur.

(Kelda: Norsk Fiskerinæring)

---

# Í dag eru vit øll grannar

**Veðurlagsbroytingarnar gera, at vit eru øll í sama báti, og tí eiga øll at hava eina áskoðan, sigur fyrrvewrandi grønlendski politikarin Aqqaluk Lynge**

VEÐURLAGIÐ
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Sum formaður í grønlendsku deildini av inuittafelagsskapinum ICC var Aqqaluk Lynge í gjár í Parlamentinum í London, sum hevði boðið honum hagar at greiða frá teimum avleiðingum, sum veðurlagsbroytingarnar hava í Grønlandi og tí arktiska økinum yvirhøvur.

Í røðuni vísti Aqqaluk Lynge, sum er fyrrverandi politikari, á, at veðurlagsbroytingarnar fara at ávirka okkum øll. Tí eru vit øll í sama báti, og tí kann eingin sita hendur í favn.

- Í dag eru vit øll grannar, segði Aqqaluk Lynge í parlamentinum.



*Aqqaluk Lynge í bretska Parlamentinum*